B36-NSÍ 1-2 (1-0):

# NSÍ líkist vinnaranum

**Runavíkingar hava nú bestu kortini á hondini í bólki 1, eftir at teir leygardagin í evstu løtu fingu togað sær trý stig á útivølli móti B36**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jákup Mørk*



*Jónstein Petersen hevur sent bóltin í málið fyri aðru ferð, og frøin á runavíkingunum er sum vera man stór*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

B36 kundi við einum sigri leygardagin ogna sær oddasessin í bólki eitt. Runavíkingar komu á vitjan, og tó at tað kanska vóru gestirnir, sum høvdu størra tørvin á stigunum, so var einki at ivast í, at teir á heimaliðnum vóru favorittar.

### B36 omaná

Fyrstu longu løtuna av dystinum var eisini líkt til, tað skuldi eydnast B36 at vinna sær tey trý stigini.

At kalla allan fyrra hálvleik vóru tað teir, sum vóru omaná. Teir royndu at leggja eitt ávíst tryst oman móti málinum hjá NSÍ, og í borðunum báðum varð roynt at bróta ígjøgnum, soleiðis at vandamikil innlegg kundu spyrjast burturúr.

Talan gjørdist tó ikki um so øgiliga nógvar málmøguleikar. Partvíst tí runavíkingarnir hava eina miðverju, sum er rættiliga sterk í luftspælinum, og partvíst tí bóltarnar ofta lógu somikið nær málinum, at Jens Martin Knudsen ikki hevði stórvegis trupulleikar av hesum.

Eftir at B36 soleiðis hevði roynt at hótt eina løtu, fingu teir hol á um hálvan hálvleikin, men tað skuldi eitt mistak frá NSÍ til, áðrenn hetta lat seg gera. Ein afturlegging til málverjan gjørdist ov stutt, og tá John Petersen var um reppið at koma ímillum, sá Jens Martin seg noyddan at nýta hondina til at steðga bóltinum.

Óbeinleiðis fríspark varð dømt. Runavíkingar stillaðu stóran manngarð á 5-metra teiginum, men lítið hjálpti. Skotið sjálvt varð sent á undirsíðuna á tvørtrænum, men Magni á Lakjuni var fyrstur at fylgja upp, og so var B36 á odda.

Tað, sum eftir var av fyrra hálvleiki, royndu teir á heimaliðnum at trýsta, men tað gekk framvegis hampuliga striltið at fáa nakrar veruligar málmøguleikar. Jens Martin Knudsen hevði tó eina góða bjarging, tá Jákup á Borg royndi seg av brotsteigarmarkinum, og John Petersen var heilt nær við einar tvær ferðir, men annars hevði NSÍ mest sum tamarhald á. Teir bitu nú eisini spakuliga frá sær, og ta einu ferðina noyddist Arnbjørn Danielsen at bjarga á málstrikuni.

### Vend kom í

Rættiliga tíðliga í seinna hálvleiki tók dysturin tó at venda. Onkursvegna tóktist tað, sum um heimaliðið ikki hevði orku til áhaldandi at trýsta runavíkingarnar, og spælið varð alt fyri eitt førkað nakað væl niðan á B36 hálvuna.

Helst var tað eisini ein stór avmarking hjá B36, at Klæmint Matras ikki fekk verið við hendan dystin. Uttan stríðsmannin og krumtappin fingu runavíkingar nógv betri rásarúm á miðvøllinum, og ikki minst tóktist Pól Thorsteinsson veruliga at koma í gongd nú.

Kanska høvdu runavíkingarnir ikki bóltin so nógv meira enn heimaliðið, men tá teir vóru í álopi, so vóru teir nógv meira beinleiðis. Royndu at stinga bóltar út í borðini, og so fáa sent innfyri, har Helgi og Sonni L. Petersen vóru menninir, sum skuldu taka ímóti bóltunum.

Annars varð hendan fyrsta løtan av seinna hálvleiki eisini merkt av, at menn nú vóru um at gerast dekan ov heitir. Serstakliga kom røk í millum Arnbjørn Danielsen og Sonna L. Petersen. Helst átti dómarin at steðgað hesum munandi skjótari við at geva teimum hvør sítt gula kort, men tá einki hendi, gjørdist spælið veruliga ófantaligt eina løtu. Hevndaratgerðir fingu loyvi at seta sín keðiliga dám á, og uttan nøkur stórvegis mótmæli kundi dómarin væl givið í øllum førum trý reyð kort hesa løtuna, men tey komu ikki, og tíbetur sissaðust leikararnir so við og við, soleiðis at tankarnir aftur fóru at leita til fótbóltin.

### Fingu lønina

B36 hevði kanska riðið ringasta stormin av sær, men tá góður tími var farin, eydnaðist NSÍ at javna. Jónstein Petersen var staddur beint uttan fyri brotsteigin, tá ein bóltur varð sendur innfyri. Í fyrstu atløtu fekk B36 vejran stútað útfrá, men við einum klokkureinum ristskoti hamraði Jónstein bóltin í kassan. Kanska helt Magnus Poulsen, at hann hevði tamarhald á harða skotinum, men tá bólturin tók høvdið á Arnbjørn Danielsen á vegnum, var málverjin fullkomuliga seldur.

Ein skuldi kanska hildið, at hetta fekk meira lív í B36 liðið aftur, soleiðis at teir nú fóru at trýsta niðaneftir, men soleiðis varð ongan tíð.

Spælið gekk framvegis rættiliga stirvið. Litil ferð ella hugflog var á, og bert tað einu ferðina hóttu teir veruliga, tá Jákup smekkaði til á tvørtræið.

Hinvegin hendi kanska heldur ikki so nógv longur, men framvegis hevði tú varhugan av, at skuldi ein avgerð fella, so máttu tað verða gestirnir, sum stóðu fyri hesi, og tá vanliga leiktíðin var farin, fingu teir løn fyri strevið.

B36 verjan var alt annað enn vakin, tá NSÍ vann sær innkast í høgra borðið. Bólturin varð tveittur til Kára Hansen, sum slapp sær at baklinjuni. Hann legði flatt útfrá málinum, og við handara stólpa kom Jónstein Petersen púrasta leysur og stýrdi bóltinum inn til ein tá samanumkom væl uppibornan sigur.

Kanska var sigurin hjá runavíkingunum fyrst og fremst grundaður á góða stríðsviljan, men yvirhøvur vóru tað eisini teir, sum sýndu betra spælið. Teir vóru nógv meira beinleiðis í spælinum. Miðvøllurin tykist nú spakuliga at vera við at koma fyri seg, og fáa álopsmenninir veruliga glið á, so er lítið at ivast í, at runavíkingar kunnu røkka heilt langt í ár. Ikki minst tí hópurin í ár tykist breiðari, enn hann nakran tíð áður hevur gjørt.

### Dysturin í tølum

**B36-NSÍ 1-2 (1-0)**
1-0: Magni á Lakjuni
1-1: Jónstein Petersen
1-2: Jónstein Petersen

VB-Sumba 4-2 (2-0):

# Sumba svaraði aftur

**VB tóktist hava fult tamarhald á, men í seinna hálvleiki skapti Sumba veruligan spenning í aftur dystin**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jákup Mørk*

Eftir at Sumba fyri viku síðani var fyri rættiligum stórtapi í Havn, vóru fá, sum góvu teimum stórvegis møguleikar, tá teir leygardagin skuldu royna seg í grannauppgerð móti VB.

Fyrra hálvleik var eisini litið, sum bendi á, at Sumba skuldi gera stórvegis skreytir. Spælið var kanska ikki so øgiliga sannførandi, men eftir at Jón Pauli Olsen og Palli Augustinussen høvdu skotið hvør sítt mál, tóktist dysturin at vera mest sum avgjørdur.

Tíðliga í seinna hálvleiki var Jón Pauli aftur á blettinum og økti um leiðsluna, og við trimum málum á muni, mundu teir á heimaliðnum ikki ivast í, at nú var leyst og liðugt.

### Svaraðu aftur

Tí mundi tað kennast sum vátur vøttur, at sumbingar als ikki høvdu hug at geva seg yvir. Heldur enn at fella í fátt, so stríddust teir framhaldandi av øllum alvi, og tað var eisini um reppi, at teir fingu løn fyri stríðið.æ

Jón Lisberg minkaði fyrst um munin, og tá Bergur Winther nakað seinni minkaði munin niður í eitt mál, stóð veruliga á hjá heimaliðnum. Tað eydnaðist teimum tó at staðfesta sigurin, tá Nenad Zivanovic móti dystarenda.

Við sigrinum eru vágbingar vísir í, at teir í øllum førum koma víðari sum besti trý'arin í bólkaspælinum, men sigurin hjá NSÍ í Havn viðførdi, at teir nú eisini hava møguleika at gerast besti tvey'arin, og harvið fáa fyrimun av heimavølli í fjórðingsfinaluni. Treytin fyri hesum er, at VB vinnur seinasta dystin móti B36.

### Dysturin í tølum

**VB-Sumba 4-2 (2-0)**
1-0: Jón Pauli Olsen
2-0: Palli Augustinussen
3-0: Jón Pauli Olsen
3-2: Jón Lisberg
3-2: Bergur Winther
4-2: Nenad Zivanovic



KÍ-HB 1-3 (0-0):

# Brennivargur í Klaksvík

**HB hevur tryggjað sær fyrsta plássið, meðan KÍ hongur í klænum tráði í steypakappingini**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jóannes Hansen*



*Eftir tapið fyri HB hongur víðari luttøkan hjá KÍ nú í klønum tráð undan seinasta umfarinum*

*Mynd: SáH*

Tað gongur ikki væl hjá KÍ, og tað gongur væl hjá HB. Tað gongur so mikið illa hjá KÍ, at teir nú hava knívin á barkanum. Um teir skulu vera við í fjórðingsfinaluni í steypakappingini, so skulu teir vinna á Toftum leygardagin, og so skal HB samstundis vinna ímóti Skála. Tað gongur so mikið væl hjá HB, at teir longu hava trygjað sær fyrsta plássið í bólkinum og harvið heimadyst í fjórðingsfinaluni.

Tað verður trupult hjá KÍ, sum hevur vánaligar fyritreytir at fara út á Svangaskarð. Heðin á Lakjuni verður leikbannaður, Hjalgrím Elttør verður burturstaddur, og Grímur Vang varð skaddur beinanvegin ímóti gamla felagnum hjá honum, HB.

Leygardagin hittust sigursvandu javnaldrarnir í Klaksvík. KÍ hevði bóltin mest, og klaksvíkingar høvdu fleiri møguleikar at gera mál. Heðin á Lakjuni var einar tríggjar ferðir um reppið at skora, og Alexander Djordjevic hevði eisini stóran møguleika.

Serliga í 1. hálvleiki var HB púrasta á afturpartinum. Teir høvdu ongan málmøguleika og royndu bara at savna seg bara um verjupartin. Eftir steðgin var tað frægari hjá HB, men KÍ stýrdi framvegis. Kortini var tað HB, sum vann ein tryggan sigur. Teir vunnu 3–1.

Fyrsta málið kom, tá 2. hálvleikur var tríggjar minuttir gamal. Rangstøðufellan hjá KÍ kiksaði. Tríggir HB spælarar komu leysir við KÍ málverjanum. Jóhannis Joensen royndi seg fyrst, men Meinhardt Joensen hálvbjargaði. Bólturin fór út til púra leysa Andrew av Fløtum, sum lættliga skoraði.

Andrew av Fløtum økti til 2–0, tá sjey minuttir vóru eftir. Hesa ferð var talan um brotsspark. Tað varð dømt, tá væl upplagdi vongverjin í høgru, Tór-Ingar Akselsen, hevði sneitt fleiri av og varð feldur í KÍ brotsteiginum. Tað málið kom sera væl við hjá HB. Dygst frammanundan vórðu teir undirmannaðir, tí Vagnur Mohr Mortensen hevði fingið seinna gula kortið.

Dómarin hevði lagt meiri enn fimm minuttir afturat vanligu leiktíðini, og henda løtan var sera hendingarrík. Innskifti Allan Mørkøre minkaði um munin fyri KÍ, tá HB málverjin og verjan fóru púra skeiv av einum innleggi frá honum, sum so fór í málið. So varð Heðin á Lakjuni útvístur fyri hevnisøku ímóti Tór–Ingar Akselsen, og í síðstu løtu staðfesti innskifti Ransin Djurhuus HB sigurin, eftir at hann varð spældur leysur av Rógva Jacobsen.

### Fleiri burtur

Bæði KÍ og HB vóru uttan onkrar av føstu monnunum. Hjá KÍ vóru Allan Joensen og Jan Andreasen ikki við, tí teir vóru skaddir. Hjá HB vóru Jan C. Dam, Uni Arge og Nicu Dogaru ikki við.

KÍ var hesa ferð í 3–5–2 útgávu: Meinhardt Joensen – Grímur Vang, Atli Danielsen, Ove Nysted – Erling Fles, Jan Joensen, Hjalgrím Elttør, Bárður á Lakjuni, Harley Bertholdsen – Alexander Djordjevic, Heðin á Lakjuni.

Grímur Vang fór út við skaða í fyrsta minutti. Tá kom Andrass Jacobsen. Allan Mørkøre og Kurt Mørkøre komu eisini inn.

HB var í 4–4–2 útgávu: Bárður Johannesen – Tór-Ingar Akselsen, Jóhannis Joensen, Jón Rói Jacobsen, Hans á Lag – Vagnur Mohr Mortensen, Rúni Nolsøe, Rógvi Jacobsen, Hallur Danielsen – Andrew av Fløtum, Rókur av Fløtum Jespersen.

### Dysturin í tølum

***KÍ-HB 1-3 (0-0)***
0-1: Andrew av Fløtum
0-2: Andrew av Fløtum
1-2: Allan Mørkøre
1-3: Ransin N. Durhuus

# Hjalgrím aftur í Aston Villa

**KÍ álopsmaðurin skal venja í Onglandi í hesi vikuni, og leygardagin skal hann til próvtøku í Birmingham**

YRKISLSLEIÐIN
*Jóannes Hansen*

Hjalgrím Elttør úr KÍ hevur eina spennandi viku frammanfyri sær. Fyrrapartin í gjár fór hann til Onglands. Í morgun skal hann venja fyrstu ferð við Aston Villa. Har skal hann vera alla vikuna. Flestu dagarnar skal hann venja tvær ferðir. Leygardagin skal hann spæla við U–19 liðnum hjá teimum. Eftir tann dystin kemur hann aftur til Føroya, og so skal hann geva tol og bíða eftir, hvat teir í Aston Villa fara at siga.

Vit loftaðu Hjalgrími á flogvøllinum fyrrapartin í gjár, meðan hann bíðaði eftir at fara í flogfarið:

– Hetta er sera spennandi. Ætlanin var, at eg skuldi fara avstað í síðstu viku, men KÍ vildi hava, at eg spældi við ímóti HB. Tíverri gekk tað ikki so væl. Nú verði eg ikki við ímóti B68. Tað harmist eg um, men í vikuni, sum stendur fyri framman, kann eg ikki hugsa so nógv um hatta. Nú ræður um at gera sítt besta, hava sjálvsálit og vóna, at tað fer at ganga væl, heldur ungi maðurin,.

Hjalgrím hevur ongantíð dult, at hann droymir um at gerast fulltíðar yrkisspælari uttanlands. Evnini eru góð, og venjingarstøðan er fín. Fyri einum lítlum mánað síðani var Hjalgrím í Aston Villa, og tað gekk væl.

– Tað var eftir venjingarleguna hjá landsliðnum á Kypros, at teir í Aston Villa settu seg í samband við okkum. Tá eg hevði verið har niðri, søgdu teir seg vera væl nøgdar við tað, sum teir høvdu sæð. Ætlanin var, at eg skuldi koma niður aftur hagar eina ferð í summar. Nú er hetta so framskundað. Tað kundi sæð út sum eitt gott tekin, men eg veit ikki rættuliga. Nú fáa vit at síggja.

Verður tú sáttmálabundin, tá tú kemur aftur til Føroya sunnudagin?

– Nei, tað rokni eg ikki við. Um teir eru áhugaðir, so mugu vit tosa um tingini, og so skal KÍ eisini upp í spælið. Í hasari verðini ræður um at vera kaldur og hugsa seg væl um, men tað er eisini neyðugt at vita, nær tað skal skrivast undir, um møguleikin verður har, sigur Hjalgrím Elttør, sum – hóast sín unga aldur – longu tykist hava innlit í, hvussu spælireglurnar eru í stóra fótbóltsheiminum.

TB-GÍ 3-3 (1-1):

# Málríkt á Tvøroyri

**TB og GÍ býttu stigini sínamillum, tá tey dystaðust leygardagin**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jákup Mørk*

Gøtumenn høvdu mest sum tryggjað sær oddasessin í deildini, longu áðrenn teir fóru til Tvøroyri, og ikki heilt óvæntað varð hesin eisini staðfestur leygardagin.

### Fingu mótstøðu

Tað var tó ikki heilt eftir bókini hjá GÍ, at teir fingu somikið nógva mótstøðu, sum teir fingu frá TB.

Longu tíðliga í dystinum vísti TB, at teir ikki uttan víðari ætlaðu at geva seg, tá Bárður Dimon var seinasti maður á einum álopi, soleiðis at bólturin varð beindur í málið.

GÍ royndi at svara aftur, og hetta eydnaðist eisini, tá Sámal Joensen fekk møguleikan av brotsteigarblettinum. Landsliðsmaðurin var ósvikaliga tryggur, og sendi í kassan, og úrslitið varð hitt sama, tá Sámal í seinna hálvleiki enn einaferð fekk møguleikan frá brotssparksblettinum.

TB og Bárður Dimon góvust tó ikki uttan víðari, og spenningur kom í aftur, tá Bárður skeyt næsta málið hjá sær, men ein avgerð tóktist tó at verða funnin, tá Súni Fríði Johannesen stóð á rætta staðnum.

Stutt fyri leiklok fekk TB tó bjargað øðrum stiginum, tá Alexander Radosavljevic fekk møguleikan.

### Hava fyrimun

Sum nevnt aðrastaðni á síðuni, so viðførdi báðir javnleikirnir í bólkinum, at alt framvegis er púrasta javnt millum tey trý liðini, sum elta GÍ á veg til fjórðingsfinaluna.

Kanska eru tað tvøråmenn, sum standa við bestu kortunum í so máta, tí teir hava fyrimunin av heimavølli í seinasta dystinum í bólkaspælinum. Allar helst er ein sigur í hesum dystinum nóg mikið til at tryggja sær víðari atgongd í kappingini.

### Dysturin í tølum

***TB-GÍ 3-3 (1-1)***
1-0: Bárður Dimon
1-1: Sámal Joensen (br.)
1-2: Sámal Joensen (br.)
2-2: Bárður Dimon
2-3: Súni Fríði Johannesen
3-3: Alexander Radosavljevic

## Bólkaspælið í kappingini um løgmanssteypið

| Bólkur 1 | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 B36 | 5 | 3 - 1 - 1 | 17 | 4 | 13 | 10 |
| 2 VB | 5 | 3 - 0 - 2 | 12 | 10 | 2 | 9 |
| 3 NSÍ | 4 | 2 - 1 - 1 | 8 | 5 | 3 | 7 |
| 4 Sumba | 4 | 0 - 0 - 4 | 3 | 21 | -18 | 0 |

| Bólkur 2 | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 GÍ | 5 | 3 - 2 - 0 | 11 | 5 | 6 | 11 |
| 2 EB/Str. | 5 | 1 - 2 - 2 | 7 | 8 | -1 | 5 |
| 3 FSV | 5 | 1 - 2 - 2 | 5 | 7 | -2 | 5 |
| 4 TB | 5 | 1 - 2 - 2 | 8 | 11 | -3 | 5 |

| Bólkur 3 | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 HB | 5 | 4 - 1 - 0 | 14 | 6 | 8 | 13 |
| 2 B68 | 5 | 2 - 0 - 3 | 10 | 11 | -1 | 6 |
| 3 Skála | 5 | 2 - 0 - 3 | 7 | 12 | -5 | 6 |
| 4 KÍ | 5 | 1 - 1 - 3 | 10 | 12 | -2 | 4 |